Fundarfrágreiding

Adalfundur 29.10.2011

Luttakarar:

Kjetil Mehus, Rógvi Finnson Johansen, Carl Johan Danielsen, Margretha Restorff, Hans Jákup Hansen, Jógvan Páll Olsen, Oddmar Vidstein, Anne Ellebye Olsen, Eli Høgnesen, Elin Restorff, Annika Restorff, Inger Danielsen og Carl Michelsen

Fundurin var hildin í Fjordbris í Østhusvik. Anne setti fundin og ynskti vælkomin. Fyrst var formannsfrágreidingin hildin har dentur serliga var lagdur á broytingina í nevndini grunda á at fyrrverandi formadurin og skrivarin, Tórdur Olsen og Marit Mortensen, eru flutt av landinum.

Fyribilsnevndin bleiv gódkend og verdur sitandi. Nevndin sær soleidis út:

| | |
|---|---|
| Formadur: | Anne Ellebye Olsen |
| Kassameistari: | Oddmar Vidstein |
| Skrivari: | Eli Høgnesen |
| Nevndarlimir: | Elin Restorff |
| | Jógvan Páll Olsen |

Ætlanir hjá felagnum.

Jólaveitslan vid innlesing av jólaheilsum verdur sum vanligt í Hundvåg bydelshus fyrsta sunnudag í desember, sum Í ár er tann 4. Hesa veitslu skipa Fía og Synnøve fyri. Innbjóding verdur send midjan november.

Ræstkjøtaveitslan er sett at vera 18. februar í Fjordbris í Østhusvik. Avgjørt var at flyta adalfundin til ræstkjøtaveitsluna í stadin fyri seydarhøvdaveitsluna og verdur næsti adalfundur sostatt 18 februar 2012

Húsini hjá Norsk Folkehjelp í Lysebotn eru bíløgd seinasta vikuskifti í august (Agnas Eystberg). Fyrispurt bleiv um at flyta henda túrin til Jóansøku, 24. juni. Samtykt var at kannad um húsini eru til taks og um so er,  at flyta túrin.

Tad bleiv heitt á nevndina at leggja ein lista yvir tiltøk vid dato á heimasíduna.

Oddmar Vidstein legdi roknskapin framm. Her bleiv dentur lagdur á at inntøkurnar eru gódar og at limagjaldid kemur inn men at Lysebotntúrurin í ár gav stórt hall sum minkar eginognina hjá felagnum. Mugu hava pening í kassanum ella á bók fyri at fyriskiparar av tiltøkum ikki mugu leggja út fyri felagid.. Útreidslurnar til Lysebotntúrin mugu minkast og luttakaragjaldid innførast fyri børn millum 4 og 16 ár. Avgjørt var at vaksin gjaldad 250 kr og børn millum 4 og 16 ár at gjaldad 100 kr fyri náttina.

Fyrispurningur frá limi um møguleika at hava vinfólk vid til tiltøk bleiv vidgjørdur. Tad er sjálvsagt møguligt at hava vinfólk vid men at hesi møguliga mugu gjalda nakad meir fyri tiltakid. Eitt av endamálunum vid einum  føroyingafelagi er at vísa føroyska mentan framm.

Fleiri mál vóru ikki løgd framm og eftir loknan fund, vard fari til seydarhøvdaveitslu.